# Byggja Brúna skúla út

## Skúlagongd verður nú aftur í skúlaum í Fr. Petersensgøtu í Havn

SKÚLI
*Eirikur Lindenskov*

Á Venjingarskúlanum í Havn er vorðið so trongt seinastu árini, at gamli skúlin í Fríðrik Petersensgøtu, Heimari skúli, ella »Brúni skúli«, sum havnarbørn altíð hava nevnt hann, nú aftur verður tikin í nýtslu.

Skúlin varð niðurlagdur sum skúli fyri nøkrum árum síðani, tó at hann okkurt árið hevur hýst m. a. framhaldsflokkum hjá Venjingarskúlum.

Seinastu árini hevur Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli nýtt skúlan til kvøldskúlaundirvísingina.

– Skúlin verður útbygdur eitt sindur suðureftir, so pláss verður fyri góðum toilettum og lærarastovu, og annars verður hann settur í stand, so hann lýkur tær treytir, sum eru til ein skúlabygning, sigur Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn.

Skúlin er bygdur fyri eini 40 árum síðani – hetta var áðrenn Venjingarskúlin varð tikin í nýtslu í 1968, og hoyrdi »Brúni skúli« saman við Ytra skúla, sum børnini nevndum »Hvíti skúli« til Kommunuskúlan. Men tá Venjingarskúlin kom, gingu smæstu børnini í vestara skúlaøkinum í hesum skúlum.

Jan Christiansen sigur, at tosað hevur verið um at bygt eina hædd oman á skúlan, men av tí at skúlin liggur í einum øki við nógvari ferðslu, verður hetta ikki hildið ráðiligt.

Í »Brúna skúla« eru fýra skúlastovur.



*Gomlu skúalvesini í garðinum eru ikki nýtandi longur. Nýggj skúlaves og lærarastova skal hýsast í nýggja parinum av skúlanum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av eystri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið mikudagin:**
Lot til andøvsgul av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og norði og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 11 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 12 |
| Nuuk | 4 |
| Qaqortoq | 8 |
| Ammassalik | 7 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 11 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 13 |
| London | 16 |
| Tromsø | 11 |
| Bergen | 14 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 19 |
| Keypmannah. | 19 |
| Helsinki | 21 |
| Moskva | 30 |
| Berlin | 21 |
| Warzawa | 32 |
| Kiev | -- |
| Bukarest | 32 |
| Paris | 20 |
| Madrid | 21 |
| Róm | 28 |
| Malorca | 29 |
| Athen | 35 |
| Malta | 32 |
| Tunis | 35 |
| Beijing | 35 |
| New Dehli | 30 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 16 |
| New York | 26 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 29 |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 18 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Ein hátrýstryggur, 1018 hPa. frá Norðhavinum til Ermasund viknar í sunnara partinum. Eitt lágtrýst, 999 hPa. vestan fyri Írland fer eystureftir og dýpist.




Eitt djúpt lágtrýst, undir 988 hPa. við Írland fer spakuliga í landsynning, meðan hátrýstið eystan fyri Ísland stendur við.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 15/07 kl. 06⁰⁰– 16/07 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 8,2°
Minsti hiti máldur í juli 0,4° Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 15/07 kl. 06⁰⁰– 16/07 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juli: 27,9 mm

### VESTFALLSKYRRINDI

20. juli: Tendring - Økusól
21. juli: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmannasundi fp. | Vestmannasundi sp. | Mykinesfirði fp. | Mykinesfirði sp. | Nólsoyarfirði fp. | Nólsoyarfirði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvannasundi fp. | Hvannasundi sp. | Fugloyarfirði fp. | Fugloyarfirði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 17. juli | 04.11 | 16.34 | 03.11 | 15.34 | 03.26 | 15.49 | 06.11 | 18.34 | 07.11 | 19.34 | 02.26 | 14.49 | 01.26 | 13.49 | 04.26 | 16.49 | 05.26 | 17.49 | 03.56 | 16.19 | 05.11 | 17.34 |
| 18. juli | 05.00 | 17.27 | 04.00 | 16.27 | 04.15 | 16.42 | 07.00 | 19.27 | 08.00 | 20.27 | 03.15 | 15.42 | 02.15 | 14.42 | 05.15 | 17.42 | 06.15 | 18.42 | 04.45 | 17.12 | 06.00 | 18.27 |
| 19. juli | 05.56 | 18.25 | 04.56 | 17.25 | 05.11 | 17.40 | 07.56 | 20.25 | 08.56 | 21.25 | 04.11 | 16.40 | 03.11 | 15.40 | 06.11 | 18.40 | 07.11 | 19.40 | 05.41 | 18.10 | 06.56 | 19.25 |
| 20. juli | 06.52 | 19.19 | 05.52 | 18.19 | 06.07 | 18.34 | 08.52 | 21.19 | 09.52 | 22.19 | 05.07 | 17.34 | 04.07 | 16.34 | 07.07 | 19.34 | 08.07 | 20.34 | 06.37 | 19.04 | 07.52 | 20.19 |
| 21. juli | 07.48 | 20.17 | 06.48 | 19.17 | 07.03 | 19.32 | 09.48 | 22.17 | 10.48 | 23.17 | 06.03 | 18.32 | 05.03 | 17.32 | 08.03 | 20.32 | 09.03 | 21.32 | 07.33 | 20.02 | 08.48 | 21.17 |


BILLUTIR
L L
LL L
LL
tlf. 421605 fax 421666

Uppsetan av antennum og parabolum
Ring og hoyr nærri ella støkk inn á gólvið





Søla og tænasta
Verkstaður
Antennu- og parabolmontering
Útleigan
radioep@olivant.fo
RADIOHANDILIN
N. Finsensgøta 16 · FO- 100 Tórshavn
Tlf. 318277 · Fax 318377

Sera bíligt at LEIGA SJÓNVARP
Úr 240,- og niðureftir
EINKI DEPOSITUM
Allar std. 20-26"
Vit hava eisini video
RADIO VERKSTAÐIÐ
V/ Guttorm Mortensen
Mannbrekka 1
Tlf. 319544

www.sosialurin.fo

Spf.
…hvør sigur at vit eru sum onnur?
Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 31 45 55
fax 31 80 26
hestoy@hestprent.fo
HESTPRENT